Jens Stoltenberg, norskur oljumálaráðharri:

Noreg vil fegið hjálpa Føroyum at menna olju- og gassvinnu

Kemur innbjóðing til mín úr Føroyum at vitja og umrøða oljuvinnu taki eg av

Noreg telist í dag millum heimsins fremstu oljutjóðir

Jens Stoltenberg, norski oljumálaráðharrin vil fegin koma til Føroya fyri at knýta samvinnu í menning av eini føroyskari oljuvinnu. Mynd: jan

Noreg hevur meira enn 25 ára drúgvar royndir við oljuvinnu, og í dag er landið eitt av teimum fremstu olju- og gassframleiðarunum í heiminum. Sum útflytari av olju og gassi er Noreg næst størst aftaná Saudiarabia.

Nakað herfyri var tann lutvíst ungi Jens Stoltenberg settur at umsita og tryggja hesa útviklingin. Hann er sonur Thorvald Stoltenberg, sum var norskur uttanríkisráðharri í fleiri ár, umframt at hann hevur verið í leiðandi altjóða størvum. Í dag er hann norskur sendiharri í Danmark.

Í Noregi verður Jens Stoltenberg mettur sum ein av teimum fremstu og mest væluntøktu politikarunum. Hann er skilagóður, dynamiskur og hevur ikki sært av karisma. Tí eru tað eisini nógv, sum gita, at hann verður forsætisráðharri í Noregi um ikki so nógv ár.

Í dag umsitur hann ídnaðar- og orkumál og harí eisini risastóru oljuvinnuna. Sosialurin hitti Jens Stoltenberg á flogvøllinum í Stavanger, tá hann var á veg til at luttaka á ráðstevnuni á altjóða oljumessuni her.

Vil heldur enn fegin vitja aftur í Føroyum

Hann er ikki ókendur við Føroyar. Í sínum ungu árum var hann her á skeiði hjá ti norðurlendska sosialdemokratiska felagsskapinum. Hon dámdi sera væl at vera í Føroyum og dylur heldur ikki fyri, at hann kundi fegin hugsað sær at vitjað aftur hendavegin.

Vit spurdu hann í tí sambandi, um hann hevði tikið av eini innbjóðing at vitja í Føroyum frá eitt nú landsstýrinum ella føroyska oljustarvsbróðuri sínum, Edmund Joensen, løgmanni.

-Eg hevði verið sera fegin um eg fekk eina slíka innbjóðing, hóast tað er ilt at siga, nær eg havi stundir at koma. Men kemur innbjóðingin, so taki eg sjálvandi av, leggur Jens Stoltenberg afturat.

Sum politikari og ráðharri hevur Jens Stoltenberg verið sera virkin í orðaskiftinum um, hvussu oljumilliardirnar hjá Noregi fara best og annars um, hvussu oljuvinnan verður best útbygd.

Takið upp samstarv

Vit spurdu, hvussu hann heldur, at eitt lítið oyggjaland og grannatjóð hjá Noregi best hevði kunnað lært av teimum norsku royndunum.

-Eg haldi føroyingar eiga at taka upp samstarv við norskar oljumyndugleikar og norsk oljufeløg. Vit hava drúgvar royndir at reka oljuvinnu til havs undir torførum veðurlíkindum, ikki minst á stórum havdýpi. Noreg er millum heimsins leiðandi olju- og gasstjóðir við serligum atliti til havið. Tað hevði tí kunnað verið til felags nyttu bæði fyri norsk feløg og fyri Føroyar, um norsku feløgini fáa loyvi til at brúka hesar royndir á føroyska landgrunninum.

Tit megna tað

Men heldur Jens Stoltenberg, at eitt lítið oyggjasamfelag sum tað føroyska megnar at taka ímóti eini sokallaðari oljuinnrás ella oljukollvelting – og fara ikki mentanin og onnur virði til grundar?

-Eg ivist ikki í, at tit megna hetta, tí her er so mangt sum líkist. Hóast Føroyar eru eitt minni land enn Noreg, so stóðu vit í Noregi úti fyri somu avbjóðingum, nevniliga sum eitt lítið land í mun til stóru altjóða oljufeløgini. Vit máttu rætt og slætt venja okkum til at handfara oljuídnaðin.

Jens Stoltenberg sigur, at Noreg hevur lagt sera stóran dent á at finna eina kombination við at hava stór altjóða feløg og ein sterkan norskan stat, sum kundi verja norsk áhugamál.

Hvussu nógv eigur tú útviklingurin í Føroyum at verða stýrdur av myndugleikunum?

Tá er tað mín meting og norsku royndirnar í heila tikið, at samfelagið skal hava sera góða og neyva stýring í sambandi við menningina av hesi vinnu. Men tað merkir sjálvandi ikki, at tit ikki skal bjóða útlendskum feløgum at arbeiða her. Noreg hevur verið sera bundið og knýtt at teimum útlendsku oljufeløgunum fyri at útvikla ein olju- og gassídnað. Uttan tey høvdu vit ikki havt nakran møguleika at verið komin so langt. Vit hava lagt dent á samarbeiði.

Jens Stoltenberg vísir á samspælið millum tey trý stóru norsku oljufeløgini, Statoil, Hydro og Saga og tey stóru altjóða oljufeløgini, sum eru komin við teknologi, kompetansu og kapitali til at troyta ræsvinni á norska landgrunninum.

Norskir myndugleikar vilja hjálpa føroyingum

Hvat vildi Jens Stoltenberg rátt føroyskum myndugleikum til at brúkt av norskum royndum, nú tá vit skulu til at gera okkara egnu oljulóggávu?

-Eg vil vera varin við ikki at koma við og ov neyvum ráðum, men norskir myndugleikar vilja fegnir tosa og viðgera okkara royndir við føroyskar myndugleikar fyri at hyggja nærri eftir lóggávu, skattareglum og praktisering av okkara olju- og gasspolitikki, sum tryggjar, at vit hava heimsins bestu oljufeløg og oljufólk, men samtíðis eisini eitt alment eftirlit við virkseminum.

Tá vit spyrja Jens Stoltenberg, um oljan hevur verið góð fyri Noreg, svarar hann avgjørdur ja, men leggur afturat, at alt hetta krevur stýring og eisini máttarhald við at brúka av oljupengunum.

Í dag setir norski staturin helvtina av øllum oljuinntøkunum til síðis fyri nettup ikki at gerast bundin av oljupengunum, tí teir eru so óvissir og kunnu minka og vaksa.

Góðar royndir við Statoil og øðrum

Heldur tú tað er skilagott at stovna eitt alment føroyskt oljufelag á sama hátt sum tykkara Statoil?

Tað mugu føroyingar sjálvir gera av, men vit í Noregi hava sera góðar royndir við at hava eina kombination av einum almennum oljufelag, Statoil, einum blandingsfelag við almennum og privatum kapitali, Hydro og síðani einum privatum felag sum Saga. Hetta hevur verið ein frálík blanding, men Statoil hevur verið heilt avgerandi fyri okkum.

Er ikki vandi fyri, at eitt so lítið oyggjaland sum Føroyar verður heilt „opslugt" av teimum stóru multinationalu feløgunum?

Nei, tað er tað ikki, um ein ansar eftir. Og tað eri eg vísur í, at Føroyar megna.

GRAVSTEINAR & KANTSTEINAR

GRAVSTEINAR frá kr. 4.200,-
KANTSTEINAR frá kr. 550,-/m
SÍDUR m/SKOYTI frá kr. 800,-/m

Vit senda prísiista við litmyndum

Síggið framsýning okkara í Runavík og í R. C. Effersøesgøtu 19 í Havn. Ringið og avtalið tíð

DANSTEIN
Runavík - Tórshavn
Tlf. 47512 - 18323 - 88050 - 34512
☆ Svarar eisini eftir arbeiðstíð ☆